Poul Gert Hansen:

# Vit geva ikki eftir



*Sjúkrahúsleiðslan noktar at geva seg tað minsta í stríðnum um umleggingarnar á Føðideildini*

**Stjórin á Landssjúkrahúsinum, Pour Gert Hansen, harmast, at felagið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum hevur tikið eitt so ógvusligt stig fyri at trýsta sín vilja ígjøgnum. - Hetta kann undir ongum umstøðum góðtakast, og vit fara ikki et geva eftir fyri einum slíkum trýsti, sigur Poul Gert Hansen**

VERKFALL
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Sambært Poul Gert Hansen var tað ein samd sjúkrahúsleiðsla, sum tók avgerðina um at umskipa føðideildina í tráð við komandi broytingar. Atlit verða framvegis tikin til allar fakbólkar, og tí hevur stjórin á Landssjúkrahúsinum sera ilt við skilja, hví sjúkrarøktarfrøðinganir nú kenna seg skúgvaði til viks, og nú taka eitt so ógvusligt stig, sum at fara í verkfall.

### Hava sagt seg úr starvi

- Tað ber ikki til at stýra einum stovni sum Landssjúkrahúsinum, um tú risikerar, at fakbólkar hótta við verkfalli, hvørja ferð ein umlegging fer fram, sum semja var um áðrenn. Tí fara vit heldur ikki at geva eftir fyri trýstinum frá fakfelagnum hjá sjúkrarøktarfrøðingunum hesuferð, sigur Poul Gert Hansen.

Hann dugir ikki at síggja, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum skal hava brotið nakran sáttmála, og tí er verkfallið eftir hansara bestu sannføring eisini ólógligt. Tað merkir í prinsippinum, at teir sjúkrarøktarfrøðingar, sum fara í verkfall nú, hava sagt seg sjálvi úr starvi.

- Eftir mínum tykki eiga sjúkraøktarfrøðingarnir at hugsa seg væl um, áðrenn tey gera eftir kravboðum frá nevndini í felagnum, tí hetta kann koma at seta tey í eina sera keðiliga støðu, sigur stjórin á landssjúkrahúsinum.

### Gerðarætt

Sum Poul Gert Hansen skilur, eru vaktartilbúgvingarnar ikki hóttar av verkfallinum enn, so lívshóttandi støður verða ikki raktar. Men støðan er nóg ring sum er, og tiltøkini hjá sjúkrarøktarfelagnum fara sjálvsagt at merkjast. Hvussu leingi hetta kann halda fram, er óvíst, men leiðslan á landssjúkrahúsinum hevur ongar ætlanir um at bakka.

- Um felagið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum metir avgerðina um føðideildina at vera brot á sáttmálan, hava tey rætt til at fara í ein gerðarætt við málinum. Tað áttu tey eftir mínum tykki eisini at havt gjørt, tí vit høvdu sjálvandi boygt okkum fyri úrskurðinum hjá einum gerðarætti, sigur Poul Gert Hansen.

Verkfall:

## Fráboðan um tiltøk

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá formanninum í sjúkrarøktarfelagnum, Janu H. Dalsgaard, í sambandi við fráboðaða verkfallið hjá felagnum fríggjadagin, áðrenn blaðið fór til prentingar. Men í skrivi boðar nevndin í felagnum frá, at tiltøkini verða sett í verk frá fríggjadegnum 6. mai kl. 08.00, har nokta verður limum felagsins at taka upp arbeiði á hesum støðum:

**Landssjúkrahúsið:**
Skurð- og narkosudeildin, sjúklingaskrivstovan, trissan, Medisinskt ambulatorium G3, tó undantikið dialysu og onkologi. Kirurgiskt- og ortopædiskt ambulatorium, Útistova, Eygnadeildin og Oyrnanøs- og háls deildin.

**Klaksvíkar sjúkrahúsi:** Skurð- og narkosudeildin

**Suðuroyar sjúkrahúsi:**
Skurð- og narkosudeildin
Heilsuskúlanum á Tvøroyri.

Ì skrivinum verður harumframt sagt, at tá tiltøkini verða herd, verður fráboðað Fíggjarmálaráðnum

**ave**

Hans Pauli Strøm:

# Metir verkfallið vera ólógligt

**- Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur ongan sáttmála brotið, og má verkfallið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum tí metast at vera ólóligt, sigur Hans Pauli Strøm, sum kortini framvegis ikki ætlar sær at leggja seg út í ósemjuna millum partarnar**

VERKFALL
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ósemjan millum felagið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum og leiðsluna á Landsjúkrahúsinum um setanina av leiðara á føðideildini fær nú avleiðingar. Felagið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum fer undir ongum umstøðum at góðtaka, at ein ljósmóður er sett sum leiðari á deildini, og í gjár boðaði formaðurin í felagnum, Jana H. Dalsgaard frá, at fríggjamorgunin leggja limirnir í felagnum arbeiðið niður.

### Tryggja sjúklingarnar

Longu tá stríðið millum partarnar tók seg upp gjørdi landsstýrismaðurin vart við, at hetta er ein ósemja millum eitt fakfelag og eina leiðslu, og tískil má metast at verða ein leiðsluspurningur heldur enn ein politiskur spurningur.

- Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur rætt og skyldu til at leggja arbeiðið til rættis innanfyri teir karmar, sum nú einaferð eru galdandi. So leingi hetta verður gjørt í tráð við galdandi sáttmálar, kann tað undir ongum umstøðum góðtakast, at eitt fakfelag forðar leiðsluni í at gera sítt arbeiði. Tí má verkfallið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum eisini metast at vera ólógligt, sigur Hans Pauli Strøm, sum kortini ikki ætlar sær at leggja seg út í ósemjuna.

Tað, sum beint nú liggur landsstýrismannnum fremst í huga, er at tryggja, at støðan gongur so lítið út yvir sjúklingarnar, sum gjørligt. Hvussu hetta kann gerast, kann hann ikki siga nakað ítøkiligt um enn, men landsstýrismaðurin hevur havt fleir fundir við leiðslurnar á teimum trimum sjúkrahúsinum, og hesir halda fram, til onkur loysn er funnin.